

*Jógvan Fríðriksson, biskupur, handaði sunnudagin Daniel Jacob Danielsen, klokkara í Sumba í eini 60 ár, heiðursmerki fyri trúgva tænastu frá Hennara Hátign Margrethu Drotning*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Klokkari fekk heiðurstekin frá drotningini

**Sunnudagin var hátíðardámur í Sumbiar kirkju. Jógvan Fríðriksson, biskupur, prædikaði og handaði Daniel Jacob Danielsen heiðurstekin fyri trúgva tænastu, tí hann hevur verið klokkari í eini 60 ár**

HEIÐURSTEKIN
Dagfinn Olsen
dagfnn@sosialurin.fo

Hátíðardámur merkti gudstænastuna í kirkjuni í Sumba sunnudagin. Prestarnir Patrick De Neergaard og Símun jacobsen vóru hjástaddir, og biskupur Jógvan Fríðriksson prædikaði.

Orsøkin til hátíðardámin var, at Jógvan Fríðriksson undir gudstænastuni skuldi handa Daniel Jacob Danielsen Droning Margrethes fortjenestemedalje.

Ljómur setti dám á gudstænastuna við sangi og LarsMensonidessomuleiðis við óførum urguleiki. Eftir prædikuna handaði Jógvan Fríðrikson Daniel Jacob Danielsen heiðursmerki og fylgiblað.

### 4. ættarlið tikið við

Heiðursmerkið fær Daniel Jacob Danielsen fyri at hava verið klokkari í Sumbiar kirkju í eini 60 ár.

Eli Poulsen, deknur, segði nøkur orð um klokkaran hesi mongu ár. Hann segði millum annað, at ongin veit neyvt at siga, í hvussu mong ár Daniel Jacob hevur verið klokkari. Hann byrjaði sum hjálparmaður ella avloysari, men í eini 50 ár røkti hann sjálvur starvið. Nevnivert er eisini, at hann var 3. ættarlið úr húsunum í Kálgarðinum, ið røkti klokkarastarvið. Og merkisverdari er tað, at nú hevur 4. ættarlið tikið við, nevniliga bróðirdóttir Dánjal Jacob.

Hátíðardámur var yvir gudstænastuni og løtan var minnilig, so lítillátin hesin trúgvi tænarin tók ímóti heiðursmerkinum, tó so greitt tað var – sum eisini varð nevnt – at hann ynskti onki hóvastak gjørt burtúr sær.

Eli Poulsen takkaði fyri árini, ið hann hevði samstarvað við Daniel Jacob Danielsen, og ynskti honum alt tað besta og tillukku við heiðursmerkinum.

-Og bernú heiðursmerkið so flittliga, legði Eli Poulsen afturat.

---

## Dagurin

**4. mars. Adrianus,** deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum. Navnið merkir maður úr Adria í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum. Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Føðingardagur

Í sambandi við runda føðingardagin og at eg skjótt gevist sum kommunulækni, verður brunch í bygdarhúsinum í Miðvági 28. mars frá kl. 11.00 til 15.00. Tey, sum vilja gleða meg við at koma, vinarliga sigið frá á tlf. 332150 / 282250 ella 333318, 273793 millum kl. 18–20 innan 18. mars.

*Elisabeth Thorsteinsson*

## Prógv

19. januar fekk Ólavur Holm, Hvalba, handað prógv sum framleiðsluverkfrøðingur frá Teknisk Fakultet, Syddansk Universitet í Odense.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Súni á Ryggi** í Miðvági andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 60 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Súna kunnu lata Miðvágs kirkju eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Lív Mohr Eyðunardóttir**, dóttir Eyðun Christiansen og Gunnvá Mohr, fer til gravar úr Vesturkirkjuni hósdagin 5. mars klokkan 13.

**Signhild Lundmark**, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Farum, andaðist mánadagin, 72 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Farum kirkju fríggjadagin klokkan 12.

**Kristina Weihe**, vanliga nevnd Nina, andaðist á Vejle sjúkrahúsi, sunnudagin 1. mars, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Svanhild Seyer Andersen**, ættað úr Tórshavn, fer til gravar hósdagin klokkan 13 úr Oppesundsby Kirkju.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu okkum samkenslu, tá ið okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Anna Margretha Johannesen**
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Joen Pauli Johannesen**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Thor Jacobsen**
Sandavágur

andaðist og varð jarðaður.
Takk til starvsfólkini á B6, til Sverra Steinholm fyri troystarrík orð á stovuni og í kapellinum.
Takk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum.
Takk til Ingu P. Dam, kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk fyri peningagávur til Meinigheitshúsið.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Osla, Tummas Jákup, Marsanna og Jetta**